# Fyrsta tapið hjá Hødd

Hødd legði í gjár rygg til sítt fyrsta tap í ár. Hødd tapti 1-2 ímóti Odd Grenland á Høddvoll-Leikvøllinum. Hødd fekk ringast hugsandi byrjanina uppá fyrireikingarnar í vikuni, tí fleiri spælarar hjá Hødd hava ligið sjúkir við magasjúku síðstu dagarnar. Odd Grenland legði seg á odda í 16. minutti við máli, sum Morten Fevang skeyt. Fimm minuttir aftaná steðgin økti Peter Kovacs til 2-0. Stutt áðrenn leiklok skoraði Joachim Magnussen fyri Hødd til endaliga úrslitið 2-1 til Odd Grenland.



# Nedved á veg til Japan

Kekkiski stórspælarin Pavel Nedved sigst nú vera ávegis til Japan at spæla. Nedved er ein av veteranunum í Juventus, og nú hann er blivin 35 ára gamal, verður ikki roknað við, at Nedved heldur fram í Juventus. Japanska felagið Jubilo Iwata sigur, at tað er í samráðingum við Nedved um at fáa hann at spæla fyri teir eftir summarsteðgin.

ÍF-B71 3-1 (2-0):

# ÍF buldrar víðari

**Uppflytararnir úr Fuglafirði eru í holt við at byggja fastan bústað í Formuladeildini. Triðja sigurin í ár fingu teir í hús í gjár, tá ið teir vunnu tryggan 3-1 sigur á B71**

FÓTBÓLTUR
*Pætur Albinus*
*patur@sosialurin.fo*

Nýggi venjarin hjá ÍF, bretski David Jones, hevur veruliga fingið fótbóltsmaskinuna í Fuglafirði í gongd aftur. Eftir eina óhepna kappingarbyrjan, har ÍF tapti heili 0-4 fyri B36 í Gundadali, er gongdin nú vend. 10. stigið ognaði ÍF sær í gjár á heimavølli, tá ið eitt svingandi B71-lið var á vitjan.

### Eitt lið á vøllinum

Á Sandoynni harmast viðhaldsfólk um, at B71 hevur trupult við at koma væl frá byrjan, og nógv taka til, at liðið bara spælir seinna hálvleik. Orðini komu til sín rætt í gjár, tá ið B71 enn einaferð spældi ein vánaligan fyrra hálvleik. ÍF vann sær skjótt takið, og longu eftir hálvum tíma var ÍF á odda 2-0. Bæði málini skeyt Bartal Eliasen, sum hesaferð leikti álopinum, av tí at Balasz Sinko var leikbannaður og Jonn Thomsen aftur var tøkur í miðverjuni. Fyrsta málið sendi Bartal í netið skamt frá brotsteigarmarkinum, meðan hann slapp at økja til 2-0, tá ið B71-verjan ikki fekk beint bóltin burtur av vandaleið.




*Fuglfirðingar sótu á mest sum øllum, tá B71 vitjaði sunnudagin*

### Trygg leiðsla

2-0 sigst at vera vandamesta leiðslan í fótbólti, men hesa leiðslu dugdi ÍF væl at halda. Í seinna hálvleiki var ÍF eisini greitt omaná, og eftir góðum tíma økti Nenad Saric til 3-0. Gott smáspæl fór fram í høgru síðu, áðrenn Nenad trakk inn í vøllin og sendi bóltin í netið.

Vellington Soares minkaði um munin 10 minuttir seinni, tá ið hann sendi eitt langskot avstað. Hetta gjørdist eisini seinasta málið í dystinum, sum ÍF trygt stýrdi og hevði hevði tamarhald á. ÍF vísti gott smáspæl allastaðni á vøllinum, og vóru eisini tolnir at taka av røttu møguleikunum.

ÍF má sigast at vera komið væl frá byrjan í Formuladeildini, meðan tað ikki gongur heilt sum ætlað hjá B71. ÍF hevur nú 10 stig, meðan B71 verður verandi á fýra stigum.

## Hevði væntað meir av B71

Bartal Eliasen, sum skeyt tvey av málunum hjá ÍF ímóti B71, tók soleiðis saman um dystin.

- Vit vóru nógv betra liðið, og skapti nógv fleiri málmøguleikar. Teir hava kanska ein málmøguleika í øllum dystinum, segði Bartal, og leggur afturat, at hann hevði væntað meir av B71, tí at teir vístu einki.

- Vit hava trúð uppá okkum sjálvar, og vit vita, at vit hava eitt gott lið. Vit hava eisini fingið nakað av fólki afturat hópinum, so vit eru styrktir, segði tvífaldi málskjúttin.

Hvør er málsetningur tykkara, nú tit liggja somikið væl fyri?

- Málsetningurin er hin sami, sum hann var áðrenn kappingarárið. Fyri meg er málið eitt 5. pláss, segði Bartal Eliasen at enda.

## Ikki nóg uppsettir

Hetta heldur 17 ára gamli Høgni Midjord, sum veruliga hevur gjørt vart við seg á B71-liðnum í ár.

- Tað virkar sum vit ikki eru nóg væl uppsettir til dystin. Venjarin dugir tó væl at seta okkum upp til dystin, men eg haldi bara at vit vóru móðir. Vit kunnu avgjørt spæla betur, enn vit gjørdu í dag. Hetta var bara ein off-day, heldur Høgni.

Hann vil tó ikki taka nakað frá ÍF.

- ÍF spældi sera væl, teir vinna næstan hvønn bólt. Teir høvdu bóltin meginpartin av fyrra hálvleiki og skapa nógvar málmøguleikar. Teir vóru heilt óvæntað góðir í dag, og hetta vísur bara, at teir vilja nakað í ár, sigur Høgni Midjord, sum serliga er bergtikin av avrikinum hjá Bartali Eliasen.

# Tvey met til Bjørk

Fimm heiðursmerki komu burturúr, tá føroyskir íðkarar um vikuskiftið tóku lut í Tårnby Games

Bjørk Herup Olsen setti føroyskt met leygardagin, tá hon rann 800 m uppá 2.22,34 min og fekk silvur. Gamla metið á teininum, 2.24,90 min, setti Rebekka Fuglø í fjør.

Sunnudagin setti Bjørk so nýtt føroyskt met á 3.000 m við tíðini 10.24,28 miní eini kapping, sum hon vann. Gamla metið, 10.48,95 min, setti Bjørk sjálv í somu kapping í fjør.

Rúni Seloy fekk sera góða tíð á 800 m og 1500 m, avíkavíst 2.08,38 min og 4.34,25 min. Hesi avrik rukku til gull og bronsu. Johannes Kristensen fekk bronsu á 80m forðarenning.

*-www.athletics.com*




*Bjørk Herup Olsen setti tvey føroysk met, og á 3.000 metra teininum rann hon seg til gull um vikuskiftið. Eisini Rúni Seloy vann gullmerki í Tårnby*

# Guttorm vann hálvt marathon

29 menn og seks kvinnur tóku lut, tá Bragdið leygardagin skipaði fyri kapping á hálvum marathon-teini.

Favoritturin hjá monnunum, Guttorm Sørensen, legði seg á odda beinanvegin, og rann á mál sum tryggur vinnari við tíðini 1 tíma 14 minuttum. og 40 sekundum.

Næstur á mál varð Andrias Hansen við tíðini 1.16,53, og honum á baki kom Henry Olsen, í harðari kapping við Eirik Hansen, sum eftir ein góðan innsats mátti lúta fyri rutinuni hjá Henry. Teir runnu teinin uppá ávíkavist 1.20,03 og 1.20,13.

Kappingina um fyrsta plássið hjá kvinnunum, stóð millum Árnu Helmsdal og Fridu Poulsen, Árna vísti seg at verða tann skjótara, og kom hon á mál 1 minutt og 12 sekund áðrenn Frida. Tíðirnar vóru 1.48,27 og 1.49,39. Karin Kirke kom á mál sum nummar trý við tíðini 1.55,42.

Kappingina hjá veteranum vann Borgar Biskupstø úr Treysti við tíðini 1.21,15, frammanfyri Absalon Hansen. Triður á mál varð Hákun Djurhuus. Majbritt Vestergaard vann hjá kvinnunum.

Super veteranurin Óli Olsen livir framvegis upp til heiti. hann vann sína kapping við imponerandi tíðini 1 tími 30 min. og 36 sek.

*-www.athletics.com*